# GÓÐ spariráð



### 1. Ansa eftir hitanum
Tað nýtist ikki at vera heitari enn 21 stig í rúminum, har tú ofta heldur til. Fyri hvørt hitastig, tað verður kaldari inni, sparir tú um fimm prosent. Skrúva hitan eitt sindur niður, tá tú ert úti og um náttina – tó ikki meira enn fýra stig, tí annars verður ov dýrt at hita uppaftur.

### 2. Spar heita vatnið
Tað er kostnaðarmikið at hita vatn. Far t.d. undir brúsuna í staðin fyri í baðikarið. Eitt baðikar tekur umleið 180 litrar, og ein brúsa nýtir á leið 10 litrar um minuttin.

### 3. Skrúva hitan fyri undir útlufting
Lufta heldur stutt út nakrar ferðir um dagin, í staðin fyri at hava vindeyguni opin allan dagin. Minst til at skrúva termostatarnar fyri, tí annars seta termostatarnir hitan upp beinanvegin. Hav annars vindeygu og hurðar afturlatin.

### 4. Bjálva húsini væl
Stórur orkumissur er í illa bjálvaðum húsum. Bjálving er ein íløga, sum verður gjørd eina ferð. Íløgan er skjót at vinna aftur, og ein varandi sparing. Bjálva loft, kjallara, veggir vatntanga og rør, og tað hevur við sær minni orkunýtslu. Minst eisini til tetta fugur runt hurðar og vindeygu, tí trekkur elvir til stóra meirnýtslu.

### 5. Kanna vindeygu og rútar
Vindeygu kunnu vera ein stórur orkumissur, tí kann tað loysa seg at skifta til orkurútar, um tú hevur ótøtt, gomul ella punkterað gløs, ella um stakrútar eru í vindeyganum. Orkurútar minka munandi um hitamissin gjøgnum rútin.

### 6. Kanna ketil og oljufýr
Eldri ketlar gagnnýta bert um 70 – 75 prosent av orkuni. Nýggir gagnnýta um 90 – 100 prosent. Stórur orku- og hitamissur er í ketlum, sum ikki verða reinsaðir, og oljufýrum, sum ikki eru rætt stillað. Einans tveir millimetrar av sóti í ketlinum hava við sær, at oljunýtslan økist um átta prosent. Um oljufýrið steðgar í heilum, kostar tað eyka, hvørja ferð húsið skal hitast uppaftur.

Føroya Shell P/F | Vestara Bryggja 10 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn | Tel 34 74 00 | Fax 34 74 90 | shell@shell.fo | www.shell.fo

# SPAR brennievni

### 1. Koyr javnt
Harðlig koyring kann økja brennievnisnýtsluna við einum heilum triðingi í mun til varðligari koyring. Lat vera við at økja ferðina ella bremsa harðliga, og royn at snara róðrinum so lítið sum gjørligt.

### 2. Koyr í hægri gervi
Jú hægri gerv, jú lægri snúningsferð á motorinum, og tað minkar brennievnisnýtsluna. Skift í hægri gerv, tá tú kanst, uttan at ovevra motorin.

### 3. Sløkk motorin, tá tú stendur stillur
Tómgongd leiðir teg ongan veg, men nýtir kortini brennievni. Sløkk motorin, tá tú bíðar eftir onkrum, og tendra ikki aftur fyrr enn tað er neyðugt.

### 4. Koyr hóvliga
Meira ferð gevur størri luftmótstøðu, sum krevur meira brennievnisnýtslu fyri at halda ferðini. Ansa eftir, at snúningsmátarin ikki fer upp í tað reyða økið.

### 5. Koyr sum minst í meldurtíð
Um tú kanst sleppa undan at koyra í meldurtíðini, nýtir tú minni tíð at bíða í ferðsluni, og so sparir tú brennievni.

### 6. Halt javna ferð
Heldur enn at lata motorin koyra í frígervi í undanbrekku, skalt tú varðveita sama snúningstalið. Tað merkir, at tú vinnur ferð, sum kann gagnnýtast heilt orkurætt, um tú seinni skalt í mótbrekku.

### 7. Stilla motorin
Kanna og innstilla motorin. Ein rætt stillaður motorur kann minka brennievnisnýtsluna við upp til 4 prosentum, so skift olju og akta tilráðingunum frá bilframleiðaranum um tænastueftirlit.

### 8. Rætt dekktrýst
Dekk við røttum lufttrýsti eru tryggari og halda longur. 1 psi ov lágt dekktrýst kann økja brennievnisnýtsluna 3 prosent. Vandi fyri breki er altíð størri á dekkum við ov høgum ella ov lágum dekktrýsti.

### 9. Ansa eftir vektini
Hvørji eyka 45 kg í bilinum kunnu økja brennievnisnýtsluna við 1 – 2 prosentum. Tak óneyðugar lutir ella viðføri, ið økja vektina, úr bilinum.



### 10. Hav vindeyguni aftur
Vindur, ið blæsir inn ígjøgnum eitt opið vindeyga, minkar ferðina á bilinum. Um tú so trýstir eitt sindur eyka á ferðilin fyri at fáa ferðina upp aftur, økir hetta brennievnisnýtsluna.

### 11. Nýt røttu oljuna
Nýt altíð ta av bilframleiðaranum viðmæltu dygdarmotoroljuna, tí tað kann minka brennievnisnýtsluna 1 – 2 prosent. Betri motorolja kann eisini betra um motordygdina.

### 12. Kanna luftfiltrini
Luftfiltrini halda óreinskum burtur, so motorurin ikki verður skaddur. Við at skifta eitt typt luftfiltur kanst tú minka brennievnisnýtsluna upp til 10 prosent og verja motorin.

Føroya Shell P/F | Vestara Bryggja 10 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn | Tel 34 74 00 | Fax 34 74 90 | shell@shell.fo | www.shell.fo